# PÁSKA-CAMP

26. - 28. mars 2018



Í samstarv við **ÍTRÓTTAHÁSKÚLAN**, bjóðar **VB** gentum og dreingum ( fødd 1999-2002 ) til páska-camp.

Tilmeldingin byrjar
**leygardagin 16. desember!**

Pláss er fyri 20 gentum og 20 dreingum fødd í 1999 - 2002.

Síggjast í Vági!



## PÁSKA-CAMP 26.-28. mars

VB og Ítróttaháskúlin í Suðuroy leggja nógva orku í at skapa eitt spennandi og mennandi hóndbólts-umhvørvið í Suðuroynni, og sum liður í hesum vilja vit bjóða tykkum til Páska Camp í døgunum 26. til 28. mars 2018.

Hesar tríggjar dagarnar fara vit at menna hóndbóltspælið, umframt at flyta nøkur mørk, eisini uttanfyri hóndbóltsvøllin. Vit fara eisini at vísa ítróttaháskúlan fram í hesum sambandi.

Umframt hetta fara vit at skipað fyri spennandi venjingum, sum hava til endamáls at menna tann einstaka hóndbóltsleikaran við støði í egna styrkjum og veikleikum.



**PÁSKA-CAMP** verður skipað undir leiðslu av venjarum og royndum spælarum, umframt royndum ítróttarfólki, sum starvast á ítróttaháskúlanum í Suðuroy.

**Undirvísarar verða m.a.:**

**Rasmus Stensgaard:**
Rasmus er venjari hjá Hvonn-deildini hjá VB og hevur eisini høvuðsábyrgdin av hondbóltslinjuni á Ítróttaháskúlanum.

**Guðmundur Joensen:**
Guðmundur er leiðari á Ítróttaháskúlanum og er fyrrverandi elitu tri-athletur.

**Øssur Eiriksfoss:**
Øssur hevur universitets-útbúgving innan ítrótt og arbeiðir á Ítróttaháskúlanum. Øssur hevur eisini vunnið donsku Ninja Warrior kappingina.

**Gurið Krosslá Augustinussen:**
Gurið spælir við Hvonn-deildini hjá VB og hevur 20 ár á baki sum hondbóltsspælari í bestu deildini í Føroyum. Gurið hevur eisini spælt fleiri A-Landsdystir.




**Á PÁSKA-CAMP kunnu spælarar væntað sær ymiskar avbjóðingar. Les meira her:**

- Spennandi markleysar adventure avbjóðingar í besta umhvørvi í landinum.

- Fyrilestrar um grundleggjandi venjing og lívstíl, sum er ein partur av Ítróttaháskúlanum.

- Venjingar við Rasmus Stensgaard, venjari hjá VB, umframt Gurið K. Augustinussen

- Video-upptøkur og -analysa av hvørjum einkultum leikara.

- Spennandi fyrilestrar um vinnara-mentalitet, elitu-ítrótt, talent og hart arbeiði, osv.

**TILMELDINGIN BYRJAR LEYGARDAGIN 16. DESEMBER. PLÁSS ER FYRI 20 GENTUM OG 20 DREINGUM FØDD Í 1999-2002.**

Kostnaður fyri PÁSKA-CAMP 2018 í døgunum 26. til 28. mars 2018 er kr. 995,- Íroknað kostnaðin er gisting, matur og ein hettutroyggja.

PÁSKA-CAMP heldur til í Vágs Høll, men leikarar gista í smáttunum hjá Ítróttaháskúlanum og eta í Stóra Pakkhúsi, har Ítróttaháskúlin heldur til.

Tilmelding fer fram á info@his.fo ella á tlf. 50 48 18 Rasmus Stensgaard. Tilmeldingar- og gjaldsfreist er 1. Februar 2018

Luttøkugjaldið skal flytast á konto í Suðuroyar Sparikassa (reg. nr. 9870) 997.675.3. Viðmerk: "Navn og PÁSKACAMP 18".

Tilmeldingin verður skipað sum “først til møllen”, tvs. at tær fyrstu 20 genturnar og teir fyrstu 20 dreingirnar fáa pláss á PÁSKA-CAMP 2018.